# AGA- & ETISKANEVNDIN

**KÆRA 6/2025**

| ***FSF-skrivstovan upplýsir Aganevndini:*** | |
|---|---|
| **Málsheitið: B68 kærir ÍF fyri brúk av ólógligum leikara, 2. deild menn** | |
| Deild: 2. deild menn | Hvør hevur reist málið: B68 |
| Kapping: Landskapping | Nevndin móttikið kæru: 24.09.2025 |
| Møguligt brot framt: 20. september 2025 | Kærugjald goldið: Ja |
| Partshoyring: Ja | 5 daga kærufreist hildin: Ja |
| Áheitan um munnliga viðgerð: Nei | Starvsnevndarummæli: Ongar viðmerkingar |

## Úrskurður

Aga- og etiskanevndin staðfestir, at Jóan Petur Samson Jónsson var at rokna sum ólógligur leikari fyri ÍF til dystin móti B68 tann 20. september 2025, við tað at tað ikki var loyvt leikaranum at flyta úr 1. deild til 2. deild at leika dyst móti B68 tann 20. september 2025, tí hetta hendi eftir at fjórðseinasti dystur var leiktur í lægri deildini.

At gera brúk av ólógligum leikara er brot á regluverk FSF's. Fordømi eru um, at slík brot verða revsaði við, at felagið verður dømt at tapa dystin í teirri deild, sum leikarin leikti ólógliga.

ÍF verður tí dømt at tapa dystin móti B68, sum varð leiktur 20. september 2025 við málmuninum 0-3 sambært grein 6, bókstav g í 3. reglubroti í Aga- og etiskureglugerðini og samsvarandi grein 41 í Kappingarreglunum fyri fótbólt.

## Kæran, partshoyringin og møguligt Starvsnevndarummæli

ÍF hevur í partshoyringini viðurkent brot á grein 9 í Kappingarreglunum fyri fótbólt og harmast mistakið.

## Heimildir hjá Aganevndini at viðgera málið

Vísandi til grein 2, 3 og 5 í Aga- og etiskureglugerðini hjá FSF, hevur Aga- og etiskanevndin málsføri at viðgera hetta mál.

## Fakta í málinum

Skrivstovan hjá FSF hevur upplýst málið og eftirkannað skrásetingarnar á dómaraseðlunum. Staðfestast kann, at Jóan Petur Samson Jónsson ikki var á dómarseðlinum hjá 2. deildarliðnum hjá ÍF tann 13. september 2025, sum er fjórðseinasti dystur hjá 2. deild monnum. Leikarin er á leikaralistanum hjá ÍF í 1. deild monnum tann 13. september 2025, har hann hevur leikt dyst. Somuleiðis er upplýst, at leikarin leikti við ÍF í 2. deild monnum tann 20. september 2025 móti B68.

## Lógarverkið

Kappingarreglurnar áseta í grein 9, at leikari kann ikki flyta frá hægri til lægri deild eftir at fjórðseinasti dystur er leiktur í lægri deildini í kappingarárinum. Hetta umfatar ikki leikarar, sum koma undir grein 8, stk. 3. Tó er loyvt leikara, sum í kappingarárinum hevur leikt í mesta lagi 3 dystir í hægri deildini, at flyta niður í lægri deildina í hesum dystum samsvarandi ásetingunum í grein 8.

Sambært grein 6 í Aga- og etiskureglugerðini, kunnu persónar og feløg verða dømd agarevsing fyri brot á fótbóltsregluverkið.

# AGA- & ETISKANEVNDIN

**Staðfestingar, metingar og niðurstøða**

Aga- og etiskanevndin staðfestir, at Jóan Petur Samson Jónsson var at rokna sum ólógligur leikari fyri ÍF til dystin móti B68 tann 20. september 2025, við tað at tað ikki var loyvt leikaranum at flyta úr 1. deild til 2. deild at leika dyst móti B68 tann 20. september 2025, tí hetta hendi eftir at fjórðseinasti dystur var leiktur í lægri deildini. Leikarin kemur ikki undir nakað av undantøkunum ásett í grein 9 í Kappingarreglunum fyri fótbólt. Talan er tí um brot á grein 9 í Kappingarreglunum fyri fótbólt.

Fleiri fordømi eru um, at feløg eru dømd at tapa dyst við málmuninum 0-3 fyri brúk av ólógligum leikarum. Aga- og etiskanevndin avgerð tí, at ÍF verður dømt at tapa dystin við málmuninum 0-3 fyri brúk av ólógligum leikara. Tapið við málmuninum 0-3 er ásett við heimild í grein 6, bókstav g í 3. reglubroti í Aga- og etiskureglugerðini og samsvarandi grein 41 í Kappingarreglunum fyri fótbólt.

**Kæruvegleiðing**

Sambært grein 10, litra f í Aga- og etiskureglugerðini, kann úrskurðurin um at ÍF tapir dystin, kærast til Yvirkærunevndina innan 5 dagar eftir, at úrskurðurin er móttikin.

**Staður, dagfesting og undirskrift:**

**Tórshavn 1. oktober 2025**

Eli Thorsteinsson
formaður

Í Aga- og etiskunevndini eru:

- Eli Thorsteinsson, formaður
- Ken Nónklett, næstformaður
- Anni á Hædd, løgfrøðingur
- Jóhan Troest Davidsen, løgfrøðingur
- Birita Sandberg Samuelsen, løgfrøðingur